## Vonn vann World Cup

Við sigri í stroki hjá kvinnum í Crans Montana í Sveis, tryggjaði Lindsey Vonn sær leygardagin samlaða sigurin í World Cup. Amerikanski skíðarin var ein hundraðpart av einum sekundi framman fyri italsku Johanne Scharf. Sostatt hevur Vonn vunnið World Cup í bæði stroki, blandaðari skíðing og super-G. Undan seinastu kappingini er hon 197 stig á odda!



## Kapping fyri bonkin

Eftir hetta kappingarárið skulu menninir á bonkinum í donsku superliguni ikki longur spæla sínar dystir í triðbestu deildini. Í staðin verður stovnað ein kapping burturav fyri eykaliðini hjá superligufeløgunum. Samstundis verður talið á liðum í næstbestu donsku fótbóltsdeildini minkað úr 16 niður í 12 lið – tó stigvíst yvir tvey kappingarár.




Málið hjá Christian Lamhauge Holst í sigrinum móti Køge í gjár var hansara sætta hetta kappingarárið

Mynd: Rólant Waag Dam

# Vit eru góðir

**Christian Lamhauge Holst skoraði í sannførandi sigrinum hjá Silkeborg á Køge. Uppflytararnir liggja eftir vetrarsteðgin nummar fýra í SAS-deildini, og tað gevur sjálvsálit. – Nú er ikki longur talan um hepni. Vit eru góðir, sigur føroyski landsliðsleikarin**




Rólant Waag Dam

Silkeborg hevur tikið flest øll í Danmark á bóli. Christian Lamhauge Holst og hinir í Silkeborg spældu seinasta ár í næstbestu deildini, har teir ikki vóru serliga sannførandi.

Tað eydnaðist teimum kortini at spæla seg upp í SAS-deildina, har hava verið ógvuliga sannførandi og hava yvirraskað tey flestu, eisini seg sjálvar.

– Vit eru sera yvirraskaðir. Ikki minst tí, at vit upp á ongan máta imponeraðu seinasta kappingarár, men spæla frálíkan fótbólt nú vit eru fluttir eina deild upp, sigur Christian Lamhauge Holst.

### Eru ikki hepnir

Tá danska fótbóltskappingin fór í vetrarfrí, lá Silkeborg á fjórða plássi. Um vikuskiftið vaknaði fótbóltsdanmark aftur úr dvala, og Silkeborg liggur framvegis á fjórða plássi.

– Tað hevði alstóran týdning, at vit fingu eina góða byrjan eftir steðgin. Ikki minst tí, at vit hava nógv at liva upp til, eftir at tað hevur gingið so væl hjá okkum, heldur Christian Lamhauge Holst, sum vísir aftur, at talan er um hepni hjá uppflytarunum.

– Vit eru ikki hepnir longur. Eftir góðu úrslitini eru vit farnir at trúgva upp á okkum sjálvar og spæla eisini væl. Øll hasi tingini hanga saman, so tað heila sær rættiliga skilagott út hjá okkum, sigur Christian Lamhauge Holst.

At okkurt er um tað, Christian Lamhauge Holst førir fram, sæst aftur á stigatalvuni. Silkeborg hevur vunnið níggju av sínum 19 dystum, spælt fimm javnleikir og hevur tapt hinar fimm. Somuleiðis hevur liðið skotið 34 mál og tað eru einans FCK og Brøndby, sum hava gjørt hetta betri enn uppflytararnir.

### Munur á uppflytarum

Er støðan góð í Silkeborg, so er hon munandi øðrvísi hjá hinum uppflytaraliðnum Køge. Teir hava einans vunnið ein dyst. Eins og Silkeborg hevur Køge hálað fimm javnleikir í hús, men ósigurin fyri Holst og hinum í gjár, var nummar 13 hetta kappingarárið.

Leingi varð tó ivast í, um dysturin millum HB Køge og Silkeborg IF skuldi spælast í gjár. »Underlaget i Køge lignede noget, som ville blive afvist i Zulu Djævleræs. Is, mudder og vandpytter var fordelt ud over noget, der bedst kan betegnes som en pløjemark«, skrivaði danska heimasíðan spn.dk eftir dystin.

– Ja, vit ivaðust leingi í, um tað yvirhøvur var ráðiligt at spæla dystin, soleiðis sum vøllurin sá út. Men nú kunnu vit ikki siga annað enn, at hetta er fantastiskt, segði sera fegni Christian Lamhauge Holst, tá Sosialurin tosaði við hann eftir dystin í gjár.

Holst skoraði síðsta málið í dystinum, sum endaði 1-4 til Silkeborg. Føroyski landsliðsleikarin kom á vøllin í 57. minutti og ein minutt seinni, tá Holst nært bóltin fyri fyrstu ferð, fór hann í netið.

## Holst var ongantíð skaddur

**Hóast danskir fjølmiðlar hava skrivað um ein umfatandi skaða hjá Holst, so vil høvuðspersónurin sjálvur ikki kennast við annað enn smásnuddir**

Christian Lamhauge Holst hevur verið skaddur í fleiri vikur, men er líka við at verða klárur aftur. Soleiðis skrivaði almenna heimasíðan hjá Silkeborg fyri trimum vikum síðani, men sambært høvuðspersóninum sjálvum hevur hann ongantíð havt nakran nevniverdan skaða.

– Nei, eg skilji ikki heilt, hvussu hatta hongur saman. Tað er rætt, at eg havi havt eitt sindur ilt í rygginum og tí havi spart meg eitt sindur til onkra venjing, men tað er eisini tað einasta, sigur Christian Lamhauge Holst.

Hann leggur aftrat, at hann hevur hoyrt frá fleiri øðrum, at hann hevur verið skaddur, men tað er altso ikki hald í tí – heldur ikki, hóast almenna heimasíðan hjá Silkeborg ber tíðindini.

### Spardur av taktiskum ávum

Christian Lamhauge Holst, sum vanliga er við frá byrjan teir flestu dystirnar hjá Silkeborg, byrjaði ikki inni í dystinum móti Køge seinnapartin í gjár.

Vøllurin var pent sagt í elendigum standi, og í danska fótbóltsheiminum undrast tey eisini á, at dysturin yvirhøvur varð spældur. Ringi vøllurin var eisini óbeinleiðis orsøkin til, at Holst byrjaði dystin á beinkinum.

– Vøllurin legði ikki upp til annað enn fysiskt spæl og langar bóltar, so tað var av taktiskum orsøkum, at eg ikki byrjaði inni, greiðir Holst frá. Føroyski landsliðsleikarin slapp tó upp í part og fekk ein góðan hálvan tíma á vøllinum.

**rólant**